# Pensjónistar kunnu missa 1000 krónur um mánaðin

**Tað er óvist um samgongan megnar at halda lyftið um at lække skattin og at bøta um samhaldsfasta eftirlønargrunnin. Tí kunnu pensónistar missa 1000 krónur um mánaðin í eftirløn**

SAMHALDSFASTI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Klárar samgongan ikki at halda síni lyfti fer tað at fáa stórar avleiðingar fyri allar pensjónistar, tí í ringasta føri kunnu teir koma at missa 1000 krónur um mánaðin í pensjón*

Pensjónistar kunnu missa næstan 1000 krónur um mánaðin.

Tað kann gerast avleiðingin um samgongan ikki megnar at halda síni lyfti um at útgaldið úr Samhaldsfasta Eftirlønargrunninum skal hækka munandi komandi árini.

Tá ið samgongan kom til, setti hon sær stórmál fyri. Eitt av hesum stórmálum vóru at lække skattin 60 milliónir um árið í øllum valskeiðnum, Eitt annað stórmál var at hækka pensjónirnar munandi. Ein partur av hækkingunum í pensjónunum skuldi fáast við at hækka samhaldsfasta, so at inngjaldið úr honum kom at hækkað munandi tey komandi árini.

Men tað var eisini ein avgjørd treyt skattalættin og ætlanin um at krevja størri inngjald í Samhaldsfasta fyri at hækka útgaldið, hingu saman.

Verður annað framt, skal hitt fremjast eisini. Verður annað slept, skuldi hitt sleppast eisini.

Í ár gekk alt sum ætlað. Skatturin lækkaði og inngjaldið til Samhaldsfasta hækkaði og sostatt eisini útgjaldið.

### Stígur komin í

Men nú er vandi fyri, at stígur kemur í.

Sum tað sæst á greinum aðrastaðni í blaðnum, er ætlanin at lække landsskattin næsta ár. Men stórur ivi er um, antin talan er um ein skattalætta, sum eisini skal føra til, at samhaldsfasti hækkar, ella um talan er um eina umlegging, sum ger at avtalan um at hækka samhaldsfasta næsta ár, eisini fellur burtur.

### Missa 1000 krónur

Sigurd Poulsen, sum er í stýrinum fyri samhaldsfasta, sigur, at útgjaldið næsta ár er ásett at vera 930 krónur um mánaðin. Tað er eftir lógini, sum nú er í gildi við einum inngjaldi uppá 0,75% frá hvørjum parti

Hevði inngjaldið í samhaldsfasta hækkað upp í 1% frá hvørjum parti næsta ár, soleiðis sum samgongan avtalaði, hevði útgjaldið verið 1200 krónur um mánaðin næsta ár.

Sostatt koma pensjónistar longu næsta ár at missa 270 krónur um mánaðin.

Men verri verður um hendan støðan heldur sær, uttan at samhaldsfasti hækkar.

So verður útgjaldið verandi á 930 krónum um mánaðin, umframt onkrar heilt smáar dagføringar.

Men verður ætlanin hjá samgonguni fylgd, hevði útgjaldið longu í 2007 komið uppá 1900 krónur um mánaðin.

Verður ætlanin hjá samgonguni ikki gjøgnumførd, koma pensónistar sostatt at missa næstan 1000 krónur um mánaðin, longu frá 2007.

Higartil hava øll goldið 0,5% av lønini og arbeiðsgevarar hava goldið 0,5% av útgoldnum lønum í samhaldsfasta.

Í ár hækkaði gjaldið upp í 0,75 frá hvørjum parti og tað hevur givið eitt útgjald uppá 910 krónur um mánaðin.

Næsta ár er útgjaldið dagført, so at tað verður 930 krónur um mánaðin.

Eftir ætlanini hjá samgonguni, skuldi inngjaldið hækkað upp í 1% frá hvørjum parti í 2006 og tað hevði ført til eitt útgjald uppá 1200 krónurum mánaðin.

Men 1. januar 2007, skuldi inngjaldið hækka eitt hálvt prosent afturat, upp í 1,5% frá høvrjum parti og tað hevði givið eitt útgjald uppá 1900 krónur um mánaðin.

Men nú er stór óvissa um framtíðina hjá samhaldsfasta og tí er vandi fyri, at útgjaldið ístaðin kemur at standa á 930 krónum um mánaðin, umframt onkrar smávegis dagføringar.

Politikarar úr samgonguni fáa onki sagt um framtíðina hjágrunninum, tí teir siga, at teire mugu føra búskaparligan politikk út frá tí veruleika sum er.

# Stígur komin í stórar ætlanir

**Spurningurin er um samgongan longu hevur svikið síni lyfti til veljaran á tveimum avgerðandi økjum - ella er tað bara eitt lyfti, sum er brotið**

SKATTALÆTTIN
*Àki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hevur samgongan svikið síni lyfti til veljaran á tveimum avgerðandi økjum- ella er tað bara eitt lyfti, sum er brotið?

Tað er spurningurin, sum mong seta sær sjálvum í hesum døgum.

Tá ið samgongan kom til í fjør, setti hon sær stórmál fyri. Eitt av hesum stórmálum var at lække skattin 60 milliónir um árið í øllum valskeiðnum, ella tilsamans 240 milliónir. Eitt annað stórmál var at hækka pensjónirnar munandi.

Ein partur av hækkingunum í pensjónunum skuldi fáast við at hækka samhaldsfasta, so at inngjaldið úr honum kom at hækkað munandi tey komandu árini.

Men tað var eisini ein avgjørd treyt í samgonguskjalinum, at lovaði skattalættin og ætlanin um at krevja størri inngjald í Samhaldsfasta fyri at hækka útgaldið, hingu saman.

Verður annað framt, skal hitt fremjast eisini. Verður annað slept, skuldi hitt sleppast eisini.

Í ár gekk alt eftir ætlan: Skattalættin varð latin, akkurát sum lovað og samstundis hækkaði inngjaldið til samhaldsfasta eftirlønargrunninum akkurát sum lovað. Bæði løntakarar og arbeiðsgevarar hava betalt 0,5% í part inn í Samhaldsfasta, men 1. januar í ár, hækkaði gjaldið hjá hvørjum parti upp í 0,75% og tað gjørdi eisini, at útgjaldið til pensjónistarnar hækkaði.

Men nú tykist longu sum um at stígur er komin í!!!

Í fíggjarlógini fyri næsta ár er greitt, at skatturin lækkar eisini 60 milliónir komandi ár.

Men enn er púra óvist um inngjaldið til Samhaldsfasta Eftirlønargrunnin eisini hækkar komandi ár og sostatt eisini pensjónirnar.

Orsøkin er, at samgongan veit ikki rættiliga, hvussu teir skulu kalla hendan vælsignaða skattalættan.

Spurningur er, um skattalættin komandi ár er tann sami skattalættin, sum varð avtalaður í samgonguskjalinum, ella um talan er um eitt endurgjald afturfyri at kommunurnar yvirtaka barnavernarøkið, so at fleiri av teimum verða noyddar at hækka kommunuskattin.

Samstundis verður barnsburðargrunnurin verður lagdur undir partarnar á arbeiðsmarknaðinum og tað fer at føra til, at avgjaldið til grunnin hækkar.

Er talan um ein skattalætta eftir samgonguskjalinum, skal inngjaldið í og útgjaldið úr Samhaldsfasta eisini hækka.

Er talan um endurgjald til skattgjaldaran, er skattalættin, sum er avtalaður í samgonguskjalinum sleptur og sostatt er samgongan heldur ikki bundin av avtaluni um samhaldsfasta.

Tey, sum eru við at verða í ørviti av øllum hesum, kunnu ugga seg við, at politikararnir í samgonguni eru minst líka trillrundir, tí teir vita heldur ikki, hvussu skattalættin skal eita.

Tá í samgongan varð skipað, varð avtalað, at skattalættin skuldi í mesta lagi vera 60 milliónir um árið.

Í ár var skattalættin 60 milliónir, akkurát sum avtalað í samgonguskjalinum

Men hóast talan kanska ikki er um ein skattalætta komandi ár, er eisini talan um at lække landsskattin 60 milliónir næsta ár.

Men tað er av tilvild, siga politikarar.